# Landsbanki Íslands

**Samrøða við Ari Wendel, leiðari fyri útlán í samband við fiskaídnaðin í vinnudeildini í Íslendska Landsbankanum**

*Vit hava ein Landsbanka í Føroyum. Greið okkum eitt sindur frá um tann Íslendski Landsbankin?*

"Vit hava tríggjar stórar bankar í Íslandi, og Landsbanki Íslands er ein teirra. Vanliga rópa vit bankan fyri tí elstu fyritøkuna í Íslandi. Tann fyrsta deildin hjá bankanum lat upp í 1886, so vit hava 120 ára føðingardag í ár. Bankin hevur sterkar røtur í tí Íslendska samfelagnum. Vit hava tær flestu deildirnar í Íslandi, og eru tey førandi innan útlán til fyritøkur; serliga eru vit sterk innan fiskaídnaðin".

*Nógvar stórar íslendskar fyritøkur hava verið virknar í útlandinum tey seinnu árini – hvussu við Landsbankanum?*

"Jú, Landsbankin hevur eisini verið virkin á útlendska marknaðinum. Eitt nú kann eg vísa á, at 35% av okkara útlánum síðsta ár fóru til útlandi. Hetta tal er voksið frá 27% síðan 2004. Bankin hevur eisini havt meiri virksemi í øðrum londum tey seinastu árini. Vit eru virkin í 12 ymiskum londum, bæði undir okkara egna navni, men eisini undir øðrum nøvnum. Í fjør keyptu vit trý evropeisk meklarafeløg, og nú eru vit í holt vit at savna hendan bólkin av feløgum undir okkara egna navni. Vit eru ein stór fyritøka – í fjør arbeiddu eini 1900 fólk í 1725 fulltíðarstørvum. Umleið 1140 av størvunum eru í Íslandi, og smá 600 í útlandinum".

*Hvørjar eru tykkara raðfestingar?*

"Okkara ætlan hevur higartil verið, at ment okkara egnu styrkir sum ein fjølbroyttur banki, og at keypa virðisbrævameklarafeløg á tí evropeiska marknaðinum, fyri síðan at tvinna hesar báðar vinnur saman. Soleiðis fáa vit sera nógvar góðar kontaktir í tí evropeiska marknaðinum og góða vitan um tann evropeiska marknaðin. Men vit lata sjálvandi eisini feløgunum nógva vitan frá okkum, so tað hetta økir um styrkina hjá báðum pørtum".

*Hvørjar eru tykkara styrkir?*

"Okkara styrkir eru kanska serliga okkara góða umdømi og góðu kontaktir í tí íslendska samfelagnum og tí íslendska vinnulívinum. Vit eru tann størsti vinnuligi bankin, og vit hava serliga holla vitan í vinnum so sum fiskaídnaði. Vit leggja nógv í fiskaídnaðin í samband við okkara útflutningsætlan – bæði sum ein altjóða fyritøka í vinnuni, og eisini innanfyri tey einstaku londini.

Vit eru byrjaði uppá virksemi í Kanada, Norra og Hollandi. Hetta hava vit gjørt fyri at luttaka í allari figgingini rundan um fiskarí, fiskaídnaðin og sølu og flutning av vørunum".

*Hvat við framtíðini hjá tykkum í Føroyum?*

"Landsbanki hevur longu nógvar góðar kontaktir við góðar føroyskar kundar, serliga í fiskivinnuni. Vit meta føroyska marknaðin vera týdningarmiklan, tí at tað føroyska samfelagið líkist nógv tí íslendska. Tískil gleða vit okkum nógv til at bjóða okkara tænastur fram í Føroyum. Vit hava longu sett okkara fyrsta starvsfólk í Føroyum, og tað er Hákun Steingrímsson. At byrja við fer hann fyrst og fremst at arbeiða við stórum lánum og ráðgeving í fyritøkum. Sostatt fer hann at umboða okkum í Føroyum", Ari Wendel sigur at enda.



*Ari P. Wendel er leiðari í vinnutænastum í Landsbanka Íslands*

# Hjálpir fyritøkum at gagnnýta upplýsingar til betri avgerðir



*– Tá ið hendan verkætlanin er liðug, er ætlanin at fara víðari, tí hetta er ikki ein skipan, sum bara kann brúkast í peningastovnum. Tvørturímóti kunnu flest allar fyritøkur og stovnar fáa gagn av henni, sigur Fróði Hansen á Elektron*

**Íslendska KT- fyritøkan, Skyrr, er farin í samstarv við Elektron um eina nýggja telduskipan til føroysku peningastovnarnar. Hetta er ein skipan, sum allar fyritøkur og stovnar, yvir eina ávísa støðd, kunnu hava fyrimun av**

Á

um herðist kappingin og samstundis herðast krøvini til leiðslu og starvsfólk. Skulu starvsfólk lúka tey krøv, sum í dag verða sett til eina nýmótans fyritøku og til kundarøktina, krevst eisini støðug, nágreinilig og áhaldandi kunning. Og tað er her at eitt telduforrit, sum eitur Business Objects kemur inn í myndina.

Business Objects er eitt tað fremsta forritið í heiminum innan Business Intelligence. Business Intellegence er felags hugtak fyri amboð, ið

## FAKTA

**Stutt um Business Objects:**

- Business Objects er ein heimsumfatandi KT- fyritøka, sum ger "business intelligence" telduforrit og fyritøkan hevur yvir 35.000 viðskiftafólk í yvir 80 londum, umframt eitt netverk við yvir 3.000 samstarvsfeløgum og umboðum.
- Viðskiftafólkini røkka frá smáum fyritøkum til stórar altjóða fyritøkur í øllum vinnugreinum

til tess at taka vælgrundaðar avgerðir.

Tað er KT-fyritøkan Skyrr, sum umboðar Business Objects bæði í Føroyum og í Íslandi.

Skyrr hevur ikki verið so sjónligt á føroyska marknaðinum higartil, men tað kann skjótt broytast.

Fyrsta stigið er longu tikið, tí nú hevur fyritøkan tikið upp samstarv við føroysku KT-fyritøkuna, Elektron um eina nýggja telduskipan til føroysku peningastovnarnar.

– Tað eru nógvir veitarar á hesum øki, men tá ið føroysku peningastovnarnir skuldu hava eina nýggja skipan, gjørdu vit eina meting saman við peningastovnunum, fyri at vita, hvør skipan kundi tæna okkum best samanlagt, sigur Fróði Hansen á Elektron, sum stendur á odda fyri hesi verkætlan.

Hann sigur, at Business Objects varð valt tí tað er so nógv útbreitt um allan heim og m.a. gera nógvir peningastovnar nýtslu av tí. Samstundis tað ikki er tøkniliga heft av nøkrum av teimum heilt stóru KT-veitarunum.

Fróði Hansen sigur, at endamálið hjá peningastovnunum við at útvega sær hesa skipanina, er at fáa gagnnýtt upplýsingar, soleiðis at ein breiðari skari av starvsfólkinum í peningastovninum – á ein einfaldan, lættan og smidligan hátt – hevur betri grundalag at veita góða tænastu og at taka skjótar vælgrundaðar avgerðir á.

Fróði Hansen sigur, at samstarvið við Skyrr hevur virkað væl og hann kann saktans ímynda sær, at samstarvið fer at halda fram, eftir at hendan verkætlanin er liðug.

– Tá ið hendan verkætlanin hjá peningastovunum er liðug, er ætlanin at fara víðari. Vit hava longu staðfest áhuga frá øðrum fyritøkum, tí hetta er ikki bara ein skipan, sum kann brúkast í peningastovnunum men flest allar fyritøkur og stovnar kunnu fáa gagn av hesi skipan, eisini lutfalsliga lítlar fyritøkur, sigur Fróði Hansen.